SKJAL 1

Í Fíggjarlógini stendur soleiðis viðmerkt:

**Ríkisstuðul**

**20.54.1. Heildarveiting o.t.**

**20.54.1.01. Heildarveiting o.t. (Onnur játtan)**

**01. Heildarveiting**
Samsvarandi avtalu við donsku stjórnina, og staðfest av Føroya Løgtingi við ríkislógartilmæli

í 2006 var árliga heildarveitingin 615,5 mió. kr. fyri árini 2007 og 2008.

**02. Endurgjøld**
Endurgjald verður rindað úr ríkiskassanum fyri eftirlønir til tænastumenn o.o., sum sett hava verið í føroyska fólkaskúlanum. Útreiðslurnar til læraraeftirlønir eru á høvuðskontu 3.23.2.07. Læraraeftirlønir (Lógarb. játtan). Til 30. juni 1997 hevur ríkiskassin endurrindað 80% av øllum útreiðslunum til læraraeftirlønir, men frá 1. juli 1997 verður endurrindað eftir L. nr. 474 frá 10. juni 1997 "Lov om ophævelse af lov om tjenestemænd m.fl. i folkeskolen på Færøerne". Eftir lógini verður skilnaður gjørdur millum eftirlønaraldur, sum vunnin er fyri og eftir 31. desember 1987. Frá 1. juli 1997 endurrindar ríkiskassin 80% av teimum eftirlønarútreiðslum, sum eru fyri eftirlønarrætt, sum vunnin er fyri 31. desember 1987.

Útreiðslurnar til læraraeftirlønir vaksa støðugt, men lutfallið millum útreiðslurnar til læraraeftirlønir og tað, ríkiskassin endurrindar, fer at minka ár fyri ár.

Endurrindanin fyri 2007 var 17,0 mió. kr. Í 2008 er metingin 18 mió. kr, og í 2009 verður roknað við 19,5 mió. kr.

**Sundurgreinað ætlan**

| | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | **2009** | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tús. kr. | R | R | R | J | **F** | Æ |
| Inntøkujáttan | 630.997 | 632.032 | 632.470 | 633.000 | 635.000 | 635.000 |
| **01. Heildarveiting** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **615.500** | **615.500** | **615.500** | **615.500** | **615.500** | **615.500** |
| *65. Flytingar úr Danmark* | *615.500* | *615.500* | *615.500* | *615.500* | *615.500* | *615.500* |
| **02. Endurgjøld** | | | | | | |
| **Inntøkur** | **15.497** | **16.532** | **16.970** | **17.500** | **19.500** | **19.500** |
| *65. Flytingar úr Danmark* | *15.497* | *16.532* | *16.970* | *17.500* | *19.500* | *19.500* |
| | | | | | | |